## UTTAN ÚR HEIMI

## Harðari revsing fyri harðskap

Revsingin fyri neyðtøku og harðskap er herd nógv í Danmark tey bæði seinastu árini, og tað sama er galdandi fyri fólk, sum verða funnin sek í at hava misnýtt børn, skrivar Berlingske Tidende.

Blaðið vísir til eina uppgerð hjá løgmálaráðnum. Har stendur, at fyri trimum árum síðani fingu fólk í meðal eitt árs fongsul fyri óviljað manndráp, men at í fjør var tann vanliga revsingin tvey ár. Í 2001 fingu fólk, sum høvdu misnýtt børn, vanliga eitt árs fongsul. Í fjør var revsingin í meðal trý ár handan rimarnar. Tá talan er um neyðtøku, er gongdin tann sama. Ein treytaleysur dómur fyri neyðtøku var í 2001 15 mánaðir í fongsli, men í fjør var hann 20 mánaðir.

Lone Espersen, løgmálaráðharri, lovaði fyri tveimum árum síðani, at løgmálaráðið fór at gera sítt til at herða revsingina fyri grov brotsverk, og hesum hava dómararnir fylgt.

## Daimler skal spara

Leiðslan á týsku bilverksmiðjuni Daimler-Chrysler hevur sett sínunm medarbeiðarum á høvuðsdeildini í Stuttgart knívin á barkan. Ganga tey ikki við til at at spara hálva fjórðu milliard krónur, verða 6.000 arbeiðspláss á deildini niðurløgd og flutt aðrastaðni.

Daimler-Chrysler eigur eina verksmiðju í Norðurtýsklandi og eina í Suðurafrika. Tað hevur víst seg, at hesar báðar verksmiðjurnar fáa nógv meiri burturúr enn tann í Stuttgart, og nú krevur leiðslan, at úrtøkan á høvuðsdeildini skal vera líka stór sum á hinum báðum. Sparingarnar, sum leiðslan ætlar at seta í verk, gera millum annað, at starvsfólk missa eyka samsýningina, sum tey fáa fyri at arbeiða um kvøldið og í vikuskiftinum. Fakfelagið hevur góðtikið at spara umleið hálva aðru milliard krónur, men tað er leiðslan als ikki nøgd við.

Ein onnur týsk stórfyritøka, Siemens, hevur fingið sáttmála við síni starvsfólk um minni løn. Siemens hótti við at flyta arbeiðsplássini til Ungarn, góðtóku starvsfólkini ikki niðurskurðin, skrivar DPA.

## Vandamikið at kyssa dýr

Í Danmark fara matvørumyndugleikarnir og læknarnir nú at ávara fólk ímóti at kyssa djór.

Berlingske Tidende skrivar, at minst trý børn á einum bóndagarði í Hillerød á Sælandi eru vorðin sjúk eftir at hava kyst djór. Tilburðurin hevur fingið myndugleikarnar at áseta ávís krøv um reinføri, men umhugsað verður at herða reglurnar uppaftur meiri.

– Djór eru ikki leiku. Hevur tú klappað einari geit á afturpartin, eigur tú at vaska tær um hendurnar, áðrenn tú fært tær at eta, sigur Birtge Vingum Jensen. Hon er formaður í einum felagi, sum virkar fyri at gera landbúnaðin til ein part av donsku ferðavinnuni.

## Ætlar at finna sjóorm

Fýra ferðir hevur sviin Jan-Ove Sundberg roynt at fanga ein stóran sjóorm, sum sigst halda til í Selfjord-vatninum í Telemark í Noregi. Nú ætlar hann at royna aftur.

Tað var í 1998, at menn komu fram á okkurt, sum bendi á, at ein stórur sjóormur er í Selfjord-vatninum. Jan-Ove Sundberg leitaði fyrstu ferð eftir orminum í 1999, og hann vil vera við, at hann sá okkurt, sum bendi á, at ormurin var har. Nú hevur hann fingið hjálp frá einum amerikanara, og teir báðir hava eisini útvegað sær serliga útgerð til leitingina.

Jan-Ove Sundberg hevur eisini ljóðupptøkur úr vatninum. Havrannsóknarstovnurin í Bergen bað fimtan altjóða granskarar kanna upptøkurnar, og teir komu til ta niðurstøðu, at ljóðið á upptøkunum er av lívfrøðiligum uppruna, skrivar Dagsavisen. Meiri vildu teir ikki siga.Sjálvur heldur Jan-Ove Sundberg, at sjóormurin í Selfjord-vatninum er góðar tíggju metrar langur.

# Summar við kavaroki og skógareldum



*Hesin bilførarin í kinesiska býnum Guangzhou hevði ikki nógv í at velja...*

**Í Norðurlondum kæra fólk seg um, at tey hava einki summar. Aðrastaðni er nógv verri**

VEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Nógvir túsund danir, norðmenn og sviar eru rýmdir av landinum teir seinastu dagarnar suður í heitari lond at halda summarfrí. Í hesum londunum hevur hitin ligið ímillum 15 og 20 stig higartil í summar, og harafturat hevur tað regnað meiri enn vanligt. Í Svøríki eru summar áir farnar upp um áarbakkarnar, og har vesturi í landinum druknaðu tvey fólk.

Men tað er ikki bara á okkara leiðum, at fólk kæra seg um summarið. Í Bretlandi hava bjargingarlið havt úr at gera aftan á nógvan vind og nógv regn, og tað sama er í Fraklandi. Í Týsklandi kavaði fyri nøkrum døgum síðani. Har suðuri í landinum máldu tey seks kuldastig, og so kalt hevur tað ikki verið har fyrr hesa ársins tíð.

Í Rumenia er øvugt. Har eru meiri enn 20 fólk deyð av ov nógvum hita, og tann sama hitabylgjan hevur eisini gjørt um seg í Grikkalandi og Makedonia. Í Portugal hevur hitin elvt til fleiri skógareldar har suðuri í landinum.

### Eisini aðrastaðni

Tað er heldur ikki bara í Evropa, at veðrið hevur verið ólagaligt í seinastuni. Í fleiri londum í Suðuramerika hevur kuldi kravt fleiri mannalív. Í Argentina frysti ellivu stig seinasta vikuskiftið, og minst seks fólk doyðu í kuldanum. Í Peru hevur verið rætiligt kavarok, og fleiri fólk eru vorðin heimleys. Í Paraguay noyddust myndugleikarnir at lata skúlarnar aftur, tí veðrið var so ringt.

Í India og Bangladesh flýggja fólk undan vatnflóð. Hesa tíðina á árinum ger monsunregnið um seg á hesum leiðunum, men avfallið í ár er tað mesta í tíggju ár, skrivar Reuters. Í Bangladesh eru tríggjar milliónir avbyrgd av tí nógva vatninum, og fleiri fólk eru deyð.

# Kvinnurnar sleppa hvørki at stilla upp ella á val

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð verður val í Saudiarabia næsta vár, men kvinnurnar sleppa ikki upp í part**

VAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá talan er um uttanríkis- og trygdarpolitikk, roynir Saudiarabia at knýta seg at Vesturheiminum. Men landið er eitt sera konservativt islamskt kongsveldi, og innanríkispolitiskt er lítið, sum líkist teimum vesturlendsku viðurskiftunum.

Fyri at tekkjast Vesturheiminum hevur kongshúsið gjørt av at halda kommunuval í apríl næsta ár, og valið er tað fyrsta har nakrantíð.

Týsdagin kunngjørdi blaðið al-Watan, at vallistarnir skulu leggjast fyri myndugleikarnar longu um tveir mánaðir, og tá skulu myndugleikarnir eisini hava at vita, hvør stillar upp. Um valreglurnar skrivaði blaðið, at bara menn, sum hava fylt 21 ár, sleppa á val, og at bara menn, sum hava fylt 26 ár, sleppa at stilla upp. Kvinnurnar sleppa sostatt hvørki á val ella at stilla upp.

Á valinum sleppa teir saudiarabisku menninir at velja nøkur av umboðunum í kommunu- og býráðunum. Myndugleikarnir hava fyrr sagt, at eydnast valið væl, sleppa menninir at velja allar bý- og kommunustýrislimirnar næstu ferð.

Saudiarabia hevur einki tjóðarting. Allar lógir skulu kortini góðkennast í tí sokallaða "shua-ráðnum". Har sita 90 menn, sum Fahd, kongur, hevur tilnevnt. Tann dagliga og ovasta leiðslan liggur í hondunum á krúnprinsinum Abdullah.



# Slóðbrótandi sveinastykki

**– Eg haldi ikki, at lærarin og sensor vistu hvat eg tosaði um, so tað hevur allarhelst kvinkað karakterin uppeftir. Tað sigur Virgar Poulsen, elektrikaralærlingur úr Saltangará, sum herfyri fekk 13 fyri sveinastykkið. Hann projekteraði eini hús, har hiti, streymur, hurðar og vindeygu eru fjarstýrd, og kunnu latast upp og steingjast via internetið ella fartelefonina**

13-TAL
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Virgar Poulsen frá Saltangará er her avmyndaður frammanfyri sveinastykkið, sum hann fekk 13 fyri í munnligu framløguni. Hetta er ein skipan, sum ger tað møguligt at tendra og sløkkja hita og el gjøgnum internetið. Eisini er møguligt at lata hutðar og vindeygu upp og aftur við skipanini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sveinastykkið sjálvt var ein uppgáva, har vit skuldu projektera eini sethús við eini standardskipan, nevnd IHC, sum merkir Intelligent House Control ella teldustýrt húsatamarhald. Tað vil siga, at tú koblar bæði hita og streym til eina telduskipan, soleiðis, at tú kanst tendra og sløkkja radiatorar og el-lutir via internetið ella fartelefonina. Tú kanst eisini tíðarinstilla tað. T.d. kanst tú programmera hitan at fara frá kl 07.00 og at slókna aftur kl 22.00, greiðir Virgar Poulsen frá. Hann sigur, at um tú ivast í, um tú hevur sløkt kaffimaskinuna, tá tú ert farin heimanífrá, so kanst tú fara inn á internetið at kanna tað. Sært tú har, at kaffimaskinan er tendrað, so kanst tú sløkkja hana ígjøgnum telduna.

Við hesi skipan eru nógvir pengar at spara. – Tú kanst eisini kobla hitan til vindeyguni ella útluftingina, soleiðis, at um vindeyguni fara upp ella útluftingin fer frá, so sløknar hitin. Harvið sleppur tú frá at gjalda fyri hitan, sum bara hevði farið út í luftina og sum tú tískil ikki hevði fingið nakra nyttu av allíkavæl, sigur Virgar.

### Seinasta skúlaskeiðið

Seinasta skúlaskeiðið hjá elektrikara lærlingunum vardi í 10 vikur. Í hesum tíðarskeiðnum skuldu lærlingarnir repetera skrivliga tilfarið og gera tvær uppgávur. Eina, nevnd PLC, har lærlingarnir skuldu programmera eina teldu til at stýra einum stórum fiskavirki, og so omanfyrinevndu IHC uppgávuna, sum var sjálvt sveinastykkið.

– Vit høvdu einar tvær vikur at gera sveinastykkið í, men eg hugsaði nógv um tað áðrenn. Áðrenn síðsta skúlaskeiðið hevði eg nevniliga installerað IHC skipanina í tvey hús, fyri meistaran hjá mær. So eg var ikki heilt ókendur á økinum, tá sveinastykkið skuldi gerast.

Virgar sigur, at hann hevði frætt um eitt modul, sum ikki var komið til Føroyar enn, og sum víðkaði nógv um møguleikarnar við IHC skipanini. T.d. kundi hetta modulið gera tað møguligt eisini at lata hurðar og vindeygu upp við fjarstýring. Hetta við nýtslu av fartelefonini.

– Tá ið vit byrjaðu uppá síðstu fimm vikurnar, bað eg læraran um at bíleggja mær eitt tílíkt modul ígjøgnum skúlan. Men tað var ógvuliga dýrt, so hann var trekur. Tað endaði við, at eg bara bílegði tað sjálvur, sigur Virgar. Tað tók heilar tvær vikur inntil modulið kom fram, so tá ráddi um at arbeiða skjótt. Nú vóru nevniliga bert tríggjar vikur eftir, til sveinastykkið skuldi vera liðugt.

### Sveinastykkið

Tað tók Virgari nakrar dagar at finna útav, hvussu hetta modulið virkaði. Síðani skuldi hann seta tað saman við uppávuni, sum eisini skuldi loysast.

– Seinastu dagarnir vóru sera tíðarpressaðir. Eg sat á skúlanum hvørt kvøld og arbeiddi við uppgávuni. Eg skuldi installera vanligu IHC skipanina, sum stýrir streymi og hita. Síðani skuldi eg installera hetta nýggja modulið, sum stýrir hurðum og vindeygum. Síðani skuldi eg kobla tey saman, soleiðis, at tey fungeraðu sum ein eind. Eg valdi eisini at tekna húsini trídimensionelt á telduni, hóast hetta ikki var partur av uppgávuni. So eg hevði úr at gera.

Virgar sigur, at hann fekk 10 fyri tað handaliga í uppgávuni. Men so skuldi hann upp í munnligum, at forsvara sveinastykkið. Hvørki lærarin ella sensor høvdu sæð hetta modulið áður, og tískil heldur ikki fyrimunirnar av tí. Hetta er ein ógvuliga góð skipan til fólk, ið bera brek, og sum í vanligum húsin høvdu verið púra óhjálpin. Við hesum kunnu tey hava ein gerandisdag, har tey klára seg sjálvi. Fartelefonin kann programmerast, soleiðis, at um tú trýstir á ein ávísan knøtt, fer t.d. eitt vindeyga ella úthurðin upp.

– Eg greiddi læraranum og sensor frá um skipanina, og eg haldi faktiskt ikki at teir vistu sjálvir, hvat eg tosaði um, sigur Virgar og flennir. – Tað eru nøkur hús í Føroyum við standard IHC skipanum, men enn eru eingi við hesum modulinum, so hetta var púra ókent fyri teimum.

Virgar fekk 13 fyri flotta arbeiðið, og lærarin hevur sagt honum, at tað var sensor, sum beinanvegin segði, at tað skuldi verða karakterurin.

Men lærarin sjálvur mundi eisini vera bergtikin, tí eftir hetta valdi hann hóast alt at gjalda fyri dýra modulið. – Nú liggur tað úti á tekniska skúla. Lærarin keypti tað frá mær, eftir at hava sæð hvussu tað virkaði, sigur Virgar.

### Elektrikaraarbeiðið broytt

Tað hendir allatíðina nógv á kt-økinum, og Virgar sigur, at hendan skipanin, sum hann valdi at taka uppí sveinastykkið, og sum hvørki lærarin ella sensor kendu nakað til, longu er vorðin ein gomul nýggjheit. Nú er ein uppaftur nýggjari og snildari skipan, nevnd AIB, sum m.a. nýggi sjúkrahúsbygningurin í Havn hevur.

– Hesar teldustýrdu skipaninar til sethús vinda meiri og meiri uppá seg, og tað eru fleiri hús í Føroyum, sum hava tær. Tað er dýrt at installera, men tú sparir tað aftur eftir fáum árum, tí skipanin er nógv meiri økonomisk enn vanliga skipanin.

Virgar heldur, at elektrikaraarbeiðið hevur flutt seg ógvuliga langt seinastu árini. – Nú snýr størsti parturin av arbeiðnum seg um teldur. Ein og hvør kann finna útav at skrúva eina peru í, men ikki øll duga at kobla eina tílíka telduskipan til elektronikkin í einum húsi, so at alt verður fjarstýrt, sigur hann.

Virgar hevur nú bert lærutíðina eftir, og verður útlærdur í oktober. Men hann verður allarhelst ikki á klettunum leingi, tí hann ætlar sær møguliga at fara til Noregs at arbeiða sum elektrikari. – Ella kanska eg fái arbeiði á einum boriplatformi. Tað er ein lítil dreymur, sum eg havi. Men nú fáa vit at síggja, sigur hann.

Òansæð hvat hann velur, verður tað neyvan torført at finna arbeiði. Ikki við einum tílíkum karakteri fyri sveinastykki.

HØLIR TIL LEIGU

- Góð ljós hølir við fínum útsýni yvir Nólsoyarfjørð, eru til leigu í Hoyvík.
- Støddin er uml. 90 m2, og er møguleiki at víðka til uml. 200 m2. Egin inngongd, toilett og køkur. Vælegnað til skrivstovu, ráðgevingarvirksemi og annað.

ÁHUGAÐI KUNNU RINGJA
21 56 09

Sosialurin 341800